# Løgreglan kannar djórapínslu



Í gjár skrivaðu um hundin her á myndini, sum seinasta fríggjadag var funnin uppi í gomlu Hoyvíkini. Hundurin var bundin soleiðis, at hann ikki hevði møguleika at svimja og er síðani tveittur á sjógv, og hevur hann tá ongan møguleika havt at lívbjargað sær.

Av løgreglustøðini verður sagt, at tey eftir áheitan eru farin undir at kanna málið. Hundurin sjálvur bar tó eingi frámerki, og tí verður sagt av politistøðini, at tey fegin vilja frætta frá fólki, sum kanska vita okkurt um hundin.

-jm

# Janus Kamban

LISTASAVN FØROYA
*Tíðindaskriv*

Leygardagin 21. juni 2003 kl. 16.00 letur Listasavn Føroya upp framsýning av verkum hjá Janusi Kamban, sum fyllir 90 ár í heyst.

Framsýningin fevnir um høggmyndir, tekningar, skitsur og prent, og fleiri av skitsunum hava ikki verið sýndr fram áður. Savnið fegnast stórliga um, at tað nú ber til at víðka støðugu framsýningina við fleiri verkum eftir henda listamann, sum hevur havt so ómetaligan týdning ikki bara fyri høggmyndalistina, men eisini fyri sítt grafiska arbeiði, sum hevur verið nýskapandi á okkara leiðum og ikki minst hevur Janus Kamban havt stóran týdning fyri listaumhvørvið sum heild í Føroyum.

Framsýningin er opin til 13. juli 2003.

Í juni eru 10 ár liðin, síðan nýggi tilbygningurin til Listaskálan varð tikin í nýtslu og umframt at halda dagin við einari framsýning við verkum hjá Janusi Kamban, sum var fyrsti stjóri á savninum, hevur Ingálvur av Reyni til sama høvi gjørt eitt litografi á Grafiska Verkstaði Føroya. Prentið verður fyri fyrstu ferð sýnt fram alment, tá framsýningin letur upp.

Upplagið telur 110 eintøk, og tað er til keyps fyri 2.400,- krónur.

Savnið vónar, at nógv fólk koma at síggja framsýningina og halda 10 ára dagin saman við okkum.



# Fýra bøkur til tey smæstu

**Bókadeild Føroya Lærarafelags hevur givið út fýra lítlar, fittar og litríkar myndabøkur til tey smæstu.**

BÓKAÚTGÁVA
*Bókadeild Føroya Lærarafelags*

Gutti og Rumpubókin eftir Guido Van Genechten. Frida Sofía Johannesen týddi.

Kennir tú Dunnubillu? og Kennir tú kettlingin Frísa? eftir Beatrix Potter.

Anna Maria R. Jensen týddi.



### Rumpubókin

Søgan snýr seg um Jákup, sum júst er givin at brúka blæu, og sum nú situr á pottinum og hugsar um rumpur og pottar.

Í bókini sært tú nógvar rumpur: tjúkkar, klænar, bleytar, strípután, flekkutar og nógvar afturat.

Rumpubókin er 28 s., innbundin og kostar kr. 30

### Gutti

Til eru tjúkkar kaninir og klænar kaninir, klókar kaninir og býttar kaninir, skikkiligar kaninir og óskikkiligar kaninir, dreingja-kaninir og gentukaninir. Og allar hava tvey long oyru. Eisini Gutti, men hann hevur ein trupulleika at dragast við. Hetta ger, at hann er øðrvísi enn hinar kaninirnar.

Gutti er 28 s., innbundin og kostar kr. 30

### Kennir tú Dunnubillu? og Kennir tú kettlingin Frísa?

Tvær fittar og stuttligar smáar pappbøkur um vinirnar hjá Peturi Kanin, Frísa og Dunnubillu.

Teksturin í bókunum ber upp á rím.

Bøkurnar eru 18 s., gjørdar úr haldgóðum pappi. Tær kosta kr. 30 fyri hvørja.

# Vertshúsið hjá Restorff

TÍÐINDASKRIV

Vertshúsið hjá Restorff í Niels Finsensgøtu er nú latið upp. Yrkadagar frá 16.00 til 22.00, Fríggjadag 16.00 til 04.00, Leygardag 14.00 til 04.00 og Sunnudag 15.00 til 24.00.

Fólk hava tikið væl ímóti listini hjá Trónda Patursyni sum hevur gjørt Vertshúsið til eitt tað mesta spennandi húsið í Føroyum, har teir sterku litirnir og glasarbeiði hava stóran ávirkan á gestirnar.

Tað fara at verða nógv tiltøk á Vertshúsinum av ymsum slagi, tónleikur, stand up comedians osfr. Fyri at menna áhugan fyri góðum føroyskum øli verður hvønn fríggjadag millum 16.00 og 18.30 gott tilboð uppá nýtappað fatøl og eisini ber til at fáa dygdarkaffi í stempulkannum og sjálvandi Restorff sodavatn til teirra sum ikki nýta alkohol.

Ovara hæddin ber til at leiga til polterabend, minni veitslur, føðingardagar, móttøkur osfr., á tlf 31 48 48.



†

Kunngjørt verður at mín góða kona og okkara kæra mamma, omma, langomma og vermóðir

**Petrina Olsen**
Leirvík

andaðist í heiminum týsdagin 17. juni, 87 ára gomul.

Jarðarferðin verður úr Missiónshúsinum leygardagin kl. 13.00.

*Familjunnar vegna*

**Óli, Bina, Oddvør, Rannvá og Óli**

Tey, sum vilja minnast Petrinu kunnu lata Missiónshúsinum eina gávu.

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at okkara høgt elskaða mamma, vermamma, omma, langomma og olduromma

**Rosa Winther**
Skopun

andaðist á Landssjúkrahúsinum mikudagin 18. juni, 87 ára gomul.

Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

**Børnini v/ fam.**



# Djóragarður í Kollafirði

**Á Búnaðardeplinum í Kollfjarðardali verður lívligt á Sundalagsstevnu. Har verður djóragarður við føroyskum hús-djórum, hundakapping, matgerð og sølu-framsýning. Umframt at ein gongukapping eisini verður fyriskipað haðani**

STEVNUTILTØK
*Edvard Joensen*



*Á djóragarðinum í Kollfjarðardali verða føroysk húsdjór sum eitt nú dunnur og høsn at síggja*

**Kollafirði:** Tað verður nógv spennandi og áhugavert at síggja á Búnaðardeplinumí Kollfjarðardali, nú Sundalagsstevna verður hildin í Kollafirði um vikuskifti.

Eitt tað mest forvitnisliga, sum er á skránni á Búnaðardeplinum hesar dagarnar, er ein djóragarður. Talan er um framsýning av føroyskum húsdjórum, eins og eisini ymisk kelidjór, sum fólk hava heima við hús, verða at síggja á støðini.

Kári Árting, formðaur í Kollafjaðrar Ítróttarfelag, KÍF, ið er ein av stevnufyrireikarunum sigur, at tey hava lagt dent á at fáa so nógv føroysk húsdjór, sum gjørligt, við á framsýningina. Og av tí, at hetta er tíðin, tá nógv teirra hava ungar, verður eisini væl av teimum at síggja.

Kálvar, lomb, fyl, dunnu- og gásarungar verða ivaleyst at síggja í djóragarðinum hesar dagarnar.

Og høsnarungar verða klaktir alla tíðina, greiðir Kári Árting frá.

Tað er soleiðis, sigur hann, at Rólvur Djurhuus, bóndi í Kollafirði, sum hevur ábyrgdina av djóragarðinum, hevur sett eina klekimaskinu við høsnareggum at klekja soleiðis, at ungarnir verða klaktir, meðan stevnan er. Soleiðis verða alla tíðina nýklaktir høsnarungar at síggja á djóragaðrinum í Kollfjarðardali. Og hvør veit? Kanska verður tað so heppið, at júst tú sleppur at standa og hyggja at, meðan hesin lítli ungin kemur úr egginum.

Eisini onnur djór, enn tey, sum inni á garðinum verða, fara at verða at síggja á økinum í Kollfjarðardali. Tað er nevniliga so, at menn, sum eiga seyðahundar, plaga at hava venjingar við teimum á økinum. Og á Sundalagsstevnuni fara nakrir teirra at vísa síni kynstur fyri fólki, sum hevur áhuga í at síggja tað. Eisini sleppa børnini at royna at sita á rossabaki. Tí ponyríðing verður sum vera man eisini á Sundalagsstevnuni.

Sunnudagin verður skipað fyri gongukapping. Har sleppa tey, sum halda seg orka eitt sindur, at kappast um at koma fyrst niðan á Sátuna og oman aftur.

Nú er tað ikki nøkur hoysáta, sum kanska stendur í bønum við Bunaðardepilin í Kollfjarðardali, fólk fáa høvið at sleppa uppá, uttan fjallið norðanvert Skælingsfjall móti Leynum, sum talan er um.

Lagt er upp til, sigur Kári Árting, at eggja ítróttarfólki, røktingarmonnum, gongufelagsfólki og hvørjum, sum nú heldur seg til, at ganga teinin úr Kollfjarðardali niðan á Sátuna og oman aftur upp á so stutta tíð sum gjørligt. Hann leggur afturat, at øll kunnu vera við á túrinum, um tey ikki leggja í at kappast um at vera fyrst. Tí túrurin er góður og lættur at ganga.

Og seta fólk sær ikki fyri at ganga allan vegin niðan á Sátuna, ber til at gera ein styttri túr, sum fyriskipaður er. Tað er niðan á Skælingstjørn. Har var fyrr ein nykur í, men ikki er sannlíkt, at tey, sum nú vitja tjørnina, síggja hann, siga fólk í dag. Tí sagt og skrivað er, at menn hava veitt hann við nót og selt hann í Havn. Talan var um eitt rættiliga stórt síl. Av teimum størstu, menn vita um at vera veitt á føroyskum vøtnum yvirhøvur.

Øll, sum luttaka í gongutúrunum, bæði niðan á Sátuna og niðan til Skælingstjørn, fáa eitt skreytblað til minnis um luttøkuna.

Rættiligur summarstevnudámur verður á økinum, siga fyrireikararnir. Leygardagin millum klokkan 18 og 20, og sunnudagin millum klokkan 17 og 19 fer kokkurin, Kirstin Ferjá Hansen úr Kollafirði, at matgera á opnari grill á økinum við Búnaðardepilin í Kollfjarðardali.

Umframt øll hesi tiltøkini, sum stevnufyrireikararnir skipa fyri, verður eisini ein søluframsýning, sum MBM hevur, á økinum, sigur Kári Árting.

Tað eigur ikki at vera nakað, sum forðar fólki í at vitja tiltøkini við Búnaðardepilin í Kollfjarðardali á Sundalagsstevnuni. Parkeringsviðurskiftini eru góð, og øll tiltøkini eru ókeypis.

# Kollfirðingar bjóða til stevnu

**Sundadalagsstevnan verður í Kollafirði um vikuskiftið. Byrjað verður í kvøld, og hildið verður á til út á sunnukvøldið**

STEVNA
*Edvard Joensen*



*Kollafjørður fer at hýsa Sundalagsstevnuni um vikuskfitið*

**Kollafirði:** Kappróður, djórðagarður, dansur og undirhald av ymsum sløgum verður á Sundalagsstevnuni í Kollafirði um vikuskiftið.

Høvuðsfyriskipari á stevnuni er Kollafjaðrar ítróttarfelag, KÍF, sum saman við skótunum, Bátafelagnum í Kollafirði og Bjargingarfelagnum stendur fyri stevnuni.

Í grundini eru ikki færri tvær stevnur í Kollafirði. Bátastevna verður, sum Øssur av Steinum fer at seta fríggjakvøldið klokkan 22.00.

Sjálv Sundalagsstevnan verður sett av Nikláa Petersen, løgtingsmanni, á havnarlagnum leygardagin klokkan 14.00. Tá fara ítróttarfólk og skótar saman við harmoniorkestrinum GHM at ganga skrúðgongu inn gjøgnum bygdina. Undir setanini fer GHM eisini at spæla.

Kappróðurin, sum telur við í FM kapingini, er sum vanligt klokkan 15.00.

Klokkan 23.00 verður midnáttarsamkoma við báli niðan fyri missiónshúsið. Thomas Arabo fer at halda røðu, og aftan á verður farið upp á gólv saman við Norðstreymoyar Dansifelag.

Dansað verður annars dúgliga í Kollafirði um vikuskiftið. Bæði fríggjakvøld og leygarkvøld verður skipað fyri dansi.

Skemtiligir hava kollfirðingar altíð borið orð fyri at vera, og onkur roynir at liva upp til tað enn. So stevnuteitið verður eisini á Sundalagsstevnuni. Og onkur vil vera við, at ávísar hendingar, sum farnar eru fram undir verkfallinum, sum var, ivaleyst fara at verða lýstar eina slíka løtu.

Hondbóltur, møtir, matsøla og annað mangt, sum vanliga er á stevnu, verður sjálvandi eisini í Kollafirði hetta vikuskiftið.


